# Dimmalætting

6 kr.

NR. 74 LEYGARDAGUR 29. JUNI 1991. 114. ÁRGANGUR







# Russiskt samfelag í Nólsoyarfirði



**Hvønn dag síggja havnarfólk tvey stór, skitin, russisk móðurskip í Nólsoyarfirði, og summa tíðir luktar tað illa frá teimum. – Fyri okkum síggja tey ógvuliga fremmand út, – hvat hendir í grundini har úti í fjørðinum. Hvussu liva hasi 200 fólkini umborð, hvussu halda tey út, at vera umborð har so leingi uttan at sleppa í land? – Spurningarnir eru nógvir.**

**Dimmalætting fekk høvi at vitja umborð í hesum lítla pettinum av Ruslandi, sum liggur í Nólsoyarfirði.**

*Sjá inni í blaðnum*

# Vandamikið ósketni

**Pápi og dóttur gjørdust kløkk tá tey funnu insulinsproytu í garðinum**

Pápin gjørdist rættiliga kløkkur, tá hann saman við fýra-ára gomlu dóttur síðan fór út í garðin, í góða veðrinum herfyri.

Mitt á grasvøllinum, sum er hegnaður inni, lá nevniliga ein sproyta. Tað vísti seg at vera ein sproyta til insulin, sum er eitt evni tey sukursjúku brúka.

### Hava ein kassa

Í dag brúka tey flestu sukursjúku fólkini eingangssproytur, og hetta hevur nógvar fyrimunir við sær. Trupulleikin er, at sproytan eftir at hon er brúkt skal burtur. Til hetta endamál fáa tey ein kassa at koyra sproytuna í, nevniliga við ti endamáli, at hon ikki skal enda á onkrum tilvildarligum stað.

Jenis av Rana, lækni, sigur at hann ongantíð áður hevur hoyrt um at fólk hava funnið sproytur á tilíkan hátt í Føroyum. Tað kann standast ein ólukka sproytuni, um eitt barn finnur og fer at spæla við hana.

### Kann henda ein ólukka

– Tað finnast tveir vandar. Tann eini er at um brúkarin hevur AIDS, er ein sproyta ein upplagdur møguleiki at bera smittuna. Tann næsti vandin er, at um sproytan ikki er tóm og trýst í botn, so finst ein partur av insulini eftir í henni. Um barnið fær hetta í seg fer blóðsukurið í botn, sigur Jenis av Rana.

Sproytuna sum tey bæði funnu í góðveðrinum, var ikki trýst heilt í botn – nakað av insulini var eftir. Um barnið hevði stungið seg, kundi vanlukka staðist av, og í ringasta føri kan tilíkt føra við sær at barnið fellur í tungt óvit (coma).

### Fáa vegleiðing

Av Apotekinum verður sagt, at tey illa kunnu trúgva, at onkur bara hevur tveitt sproytuna frá sær. Fólk fáa vegleiðing, og vita at tey skulu koyra sproytuna í kassan, sum tey fáa í sambandi við sproytuna.

Í hesum føri er talan neyvan um at onkur bara hevur mist sproytuna. Hon lá mitt inni í garðinum, og sum nevnt omanfyri er hegn rundan um.

### Neyvan føroysk

Alt bendir tó á, at tann sproytan sum var funnin, ikki var føroysk. Hóast vit orsaka av tíðarneyð ikki kundu vísa hvørki Apotekinum ella Jenis av Rana sproytuna, bendir alt á at talan er um útlendska sproytu. Hon hevur ikki tað skap sum ein tilík hevur, tá fólk fáa hana í Føroyum.

glp



**Sproytan, sum varð funnin í garðinum og kundi ført til eina vanlukku**
















## *Isolation eller samkvem*

DET har tilsyneladende vakt ikke ringe opsigt, at Sambandspartiets nye formand i Lagtinget, Edmund Joensen, efter selv at have orienteret sig i Bruxelles om den nye europæiske markedsdannelse EF (Fællesmarkedet), har fremsat en kategorisk erklæring om, at en færøsk indlemmelse er egnet til at sikre Færøernes fremtidige velfærd.

Tilhængere af andre partier end Sambandspartiet har yndet at beskrive Sambandspartiet som »bagstrævere«, d.v.s. imod alt, hvad der er anderledes eller nyt, og det lader til, at ogsaa en eller flere hidtidige sambands-tilhængere har faaet ind i blodet, at netop bagstræb er det rette at holde paa.

Men nu lader det til, at andre politiske partier, sammen med visse sambands-sindede mennesker protesterer imod, at Sambandspartiet agter paa tidens skiftende bevægelser og med vaagent øje følger med i ændringerne, som foregaar i den europæiske omverden, ikke mindst, hvor det gælder om at sprænge de isolationsbegrænsninger, som vi her paa øerne alt for længe har været i gang med, og som har medført, at det gaar skidt med økonomien saavel i den hjemlige politiske styrelse som ude i befolkningen.

Der er nok ikke saa helt faa herhjemme, som har troet paa, at blot vi fjerner dansk støtte og hvad dertil hører, saa gaar det langt bedre, saavel økonomisk som paa anden vis. Men det er ikke tilfældet, fordi det tvært imod er sket, at det er gaaet skævt herhjemme i saa at sige enhver maade, ikke mindst, hvor arbejdsledigheden er vokset ud over alle grænser. »Vi vil være os selv«, synes løsenet herhjemme at være, medens omverdenen ganske modsat satser paa at udvide samarbejdet med den øvrige verden mest muligt for at gavne sig selv.

Vel er Fællesmarkedet (EF) næppe noget virkeligt Paradis, hvor det flyder med mælk og honning, men et medlemsskab her byder paa økonomiske fordele, som vi ellers ikke har for vor eksport, som hovedsagelig foregaar til netop dette vide marked. Og hvis vi maatte tvivle paa egne paavirkninger af et medlemsskab her, saa har vi i hvert fald Danmark som medlem i dette fællesskab til at støtte os, hvis det ellers skulle knibe med at lade sin røst høre.

Saadan som tingene udvikler sig kan der ikke være mindste tvivl om, at det europæiske fællesskab er inde i en saadan gang, at det om kort tid vil være dominerende i vestlig og delvis ogsaa østlig handel. Før eller siden vil vi utvivlsomt erfare, at det vil ske. Vil vi være med heri eller ikke? Det er det brændende spørgsmaal. Vil vi med er der ingen tvivl om, at det vil gavne den hjemlige økonomi og social velfærd. Vil vi det ikke, saa sidder vi fremdeles i den sociale utryghed, som vi har i dag!



**Formaðurin í hetlendska fiskimannafelagnum:**

# Oljan eisini fyrimunir

**– men tit mugu vera til reiðar og seta krøv, so fáa tit mest burturúr**

– Tit hava orsøk til at vera bangin, og mugu fara varliga fram tá tað snýr seg um møguliga oljuvinnu. Um tit vísa hetta fyrivarni fáa tit eisini mest burturúr, sigur John Goodlad, formaður í Shetland Fishermen's Association (hetlendska fiskimannafelagið), við *Dimmalætting*.

Tá oljuvinnan byrjaði við Hetland miðskeiðis í 70-unum, vóru hetlendingar rættiliga bangnir fyri hvørjar avleiðingar hetta kundi fáa, eitt nú fyri fiskivinnuna.

### Stongdar fiskileiðir

– Enn hava vit ikki verið vitni til at oljuvinnan hevur verið orsøk til dálking, hóast vandin allatíðina er til staðar. Tað ringasta sum hendi var, at nakrar av fiskileiðum okkara vórðu stongdar, vegna rørleiðingar, ið vórðu lagdar til Sullom Voe, sigur John Goodlad.

Hann sigur at hetlendingar ikki lógu á løtu síðuni, tá oljuvinnan byrjaði.

– Tað eru altjóða stórar fyritøkur ið standa fyri boringunum, og tað er ikki umhvørvi og fiskimenn ið liggur teimum fremst í huganum. Tí mugu tit verða til reiðar og seta krøv, sigur John Goodlad.

### Vandi í allari vælferð

Spurdur um oljuvinnan er verd tann váða sum kann standast av henni, eitt nú dálking, gerst John Goodlad meiri ivasamur – tað finst bæði váði og fyrimunur við oljuboringunum.

– Fyri okkum fiskimenn kann dálking gerast ein ólukka, men Hetland sum heild hevur higartil notið gott av vinnuni. Vit fiskimenn hava eisini fingið okkara part, av tí at ein partur av inntøkunum er brúkt til útbygging av okkara havnarløgum, sigur John Goodlad.

### Avmarkaðan avgerðarrætt

Hetland verður sum kunnugt fyri størsta partin stýrt úr London, men heilt uttan ávirkan eru hetlendingar ikki, tá tað snýr seg um oljuvinnuna.

Í 1974 varð avgjørt í bretska parlamentinum, at hetlendingar sjálvir skuldu fáa rættiliga stóran avgerðarrætt í sambandi við oljuvinnuna.

Í stóru oljuhavnini Sullom Voe hava hetlendingar nærum alt at siga.

glp

# Sjóvinnubankin keypti »Borgina«

**Landskassin misti góðar 2 mió. kr., tá bankin keypti flakavirkið fyri einar 7,5 mió. kr.**

Sum væntað, var tað Pf. Sjóvinnubankin, sum keypti flakavirkið »Borgina« heima á Sandi í Fútarættinum hósdagin.

Peningastovnurin keypti »Borgina« fyri slakar 7,5 mió. kr., men flakavirkið varð ikki selt víðari til áhugaðan keyparabólk í oynni sama seinnapart, so sum ætlanin var dagin fyri tvingsilssøluna.

Ein av orsøkunum til hetta er, at virkið skal lúka tær treytir, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur sett flakavirkjum fyri at løggildingin skal galda.

Tí er einki virksemi á »Borgini« longur. Væntandi kemur tað at taka einar tveir mánaðir, t. v. s. alt summarið, áðrenn tær ábøtur eru gjørdar, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur kravt.

Hesar ábøtur kostar ikki heilt einki. Mett er, at arbeiðið kemur at kosta millum 3 og 4 mió. kr., soleiðis at Sjóvinnubankin við hesum útreiðslum aftrat keypsprísinum, tilsamans hevur lagt einar 11 mió. kr. út, tá samanum kemur og sum hann síðani skal hava innaftur við eini víðari sølu til áhugað í Sandoynni.

Hetta var annars ikki tað sum ljóðaði, tá peningastovnurin dagin fyri tvingsilssøluna skuldi bjóða uppá »Borgina«. Tí ætlanin var at selja flakavirkið sama seinnapartin víðari til annan keypara í oynni fyri einar 12 mió. kr. Men nú verður so bíðað, til allar ábøtur eru gjørdar inni á virkinum.

Við tvingsilssøluni av »Borgini« hósdagin misti Landskassin góðar 2 mió. kr.

B

# Seinkaður terminalur

**Ferðafólkaterminalurin liðugur 20. juli**

20. juli er nú settur sum dagurin, tá nýggi ferðafólkaterminalurin á havnarlagnum í Havn skal verða liðugur.

Hetta arbeiði er seinkað í meiri enn ein mánað. Fyrsta freistin var 1. juni, men orsakað av verkfalli og øðrum, er arbeiðið seinkað munandi.

– Henda freist eigur at fara at halda, og tá skuldi alt arbeiði verið liðugt, og terminalurin takast í nýtslu, sigur Poul Michelsen, borgarstjóri í Havn.

### Serbygda landgongin

Tað er bert sjálv bygningin av terminalinum sum er umfatað av hesi tíðarætlan, og ikki tann serbygda landgongin. Poul Michelsen sigur, at hann kortini væntar, at hetta arbeiði eisini verður liðugt til tann 20. juli, so terminalurin stendur liðugur allur sum hann er.

Tað er Tórshavnar Skipasmiðja sum hevur gjørt landgongina, ið er soleiðis háttað, at hon samtíðis sum hon er knýtt at terminalinum, kann flytast aftur og fram, upp og niður. Hon er tillagað øllum ferðamannaskipum, sum kunnu hugsast at koma á Havnina.

glp